

Fyrr gingu ofta nógv ár, frá tí, at eini hús komu upp, til eigararnir fóru at hugsa um urtagarð. Summi fingu tað ongantíð í lag.

– Nú hugsa heilt nógv fólk beinanvegin um at gera uttan um húsini.

Tað vísir seg eisini, at fer onkur í grannalagnum undir at gera sær urta-garð, fara hini í grannalagnum eisini at gera sær urtagarð.

Dan tosar um, hvussu gott hann hevur tað, tá ið hann skavar í moldini uttan um húsini. Hann nýtur at eygleiða, hvussu væl alt veksur. Og so alt tað vakra. Hann hevur einki ímoti at vísa sín prýðiliga urtagarð fram.

– Tað er lítil meining í at hava málningar eftir Ingálv av Reyni, krystall og annað fínt inni, tá alt liggur sum eitt runudíki uttanfyri. Tað, sum er úti, síggja fleiri fólk.

Dan hevur sett nakað av føroyskum plantum niður, men fleiri teirra breiða seg í so nógv, tá tær koma í dyrkaða mold.

– Eg ávari ímóti eitt nú bátsmanshatti, reyðakkuleygu, skøru og akurstisli, men bjargablóma og makja eru góðar plantur at hava í urtagarðinum, og blákollur er sum ein stauda, sigur Dan.

Tað eru nógv ár síðan, at Fuglafjørður varð vetrarfriðaður, og tað er fyrsta treytin fyri at kunna hava urtagarð. Við vetrarfriðingini slepst eisini frá at gyrða seg inni við hegni ella rimaverki.

### Ongantíð liðugur

Hóast planturnar í urtagarðinum eru nógvir, heldur Dan fram við at taka ímóti plantum og keypa nýggjar.

– Eg fari ikki fram við einum handli, sum selur plantur, uttan at fara inn at vita, um ikki okkurt nýtt er, sigur Dan.

Hann hevur sera gott samstarv við Kristinu Ellingsgaard á Kambsdali. Tey hava samstarvað um plantur i fleiri ár, hava býtt um plantur, og tá ið annað teirra rennir seg fram á onkra sjáldsama plantu, keypa tey til hin partin eisini.

Eftir at Dan veruliga hevði fingið áhuga fyri plantum, tók hann stig til at stovna Fuglafjarðar Urtgarðsfelag. Á fyrsta fundinum møttu 30 fólk, og fleiri eru komin upp í felagið síðan.

Felagið hevur ein umbýtingardag á hvørjum ári, og hetta hevur nógv at siga serliga fyri nýbyrjararnar, tí plantur kosta nógv at keypa.

Tey hava verið útferðir og hugt eftir urtagørðum. Eina ferð vóru tey í Klaksvík, har gartnarin Hans Hjalti Skaale vísti teimum runt úti í Grøv. Tey hava somuleiðis vitjað Gróðursstøðina í Havn og fingu tá góða frágreiðing frá Tróndi Leivsson.

Dan rósar Fuglafjarðar kommunu fyri kappingina um vakrasta urtagarð, tí tann kappingin eggjar veruliga fólki til at prýða uttan um húsini. Onkuntíð hevur kommunan eisini býtt út plantupakkar.

– Ein urtagarður verður ongantíð liðug-ur, tí vit broyta altíð okkurt. Men tað er ikki nøkur byrða at hava urtagarð. Hug-urin hjá mær at fara útum er altíð góður. Hetta er ein deilig árstíð, og urtagarðurin er so góður fyri sinnið, sigur Dan, sum altíð hevur onkrar nýggjr ætlanir.

Næst á skránni verður helst ein terassa og kanska eisini ein pavillion.



*Konan Marjun hevur stoypt hesi prýðiligu bløðini. Eitt rabarbublað varð lagt oman á sand, betong stoytt útyvir, og hetta var úrslitið*

## Fleiri ymisk trø standa runt um húsini

Dan R. Petersen sigur, at at áhugin fyri urtagørðum er eksploderaður seinastu árini.

– Fyrr gingu ofta nógv ár, frá tí, at eini hús komu upp, til eigararnir fóru at hugsa um garðin. Nú gera fólk í stand uttanum - Nú hugsa heilt nógv fólk beinanvegin um at gera uttan um húsini





*Hugskotið til henda hjalsveggin fekk Dan eitt árið, hann var og feraðist sunnanfyri*



*Dan nýtir hvørja løtu úti millum allar sínar plantur*